## Fríðfinnur heldur flaggrøðu í Leirvík

Fornminnisfelagið í Leirvík skipar fyri flaggdagshaldið flaggdagin klokkan 15, har Fríðfinnur Johnsson, fyrstilærari flytur fram røðu og kórið Eystanljóð - fyrr Gøta/Leirvík - syngur. Aftaná verður Kondibingo, kaffi og tea verður at fáa, eins og saft og vaflur - í Skótahúsinum. Og tað er ókeypis, sigur Fornminnisfelagið í Leirvík.



## Leif nýggjur í nevndini

Mikudagin 16. apríl hevði Gistingarhús- og Matstovufelagið aðalfund. Á Aðalfundinum stóðu Uni Danielsen, Ása Johnsdóttir og Eirik Suni Danielsen. Ása Johnsdóttir stjóri á Hotel Hafnia og Eirik Suni Danielsen stjóri á Gjáargarið stillaðu uppaftur og vóru afturvald. Uni Danielsen bar seg undan afturvali, og í hansara stað var Leif Sørensen stjóri á Gourmet valdur. Í nevndini í Gistingarhús- og Matstovufelagnum sita nú Ása Johnsdóttir, Eirik Suni Danielsen, Leif Sørensen, Kjartan Dalsgarð og Kári Hentze. Nýggja nevndin skipar seg á fyrstkomandi nevndarfundi.

# Stórfingið føroyskt framsý

**Durita í Grótinum, sum er projektleiðari hjá SamVit, er við á European Seafood Exhibition í Brússel. Hon sigur, at føroysku fyritøkurnar, sum eru við á føroyska landabásinum, hava havt úr at gera við nógvum vitjandi og nógvum fundarvirksemi við áhugaðar keyparar og seljarar**

**BRÚSSEL**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt/Rás2*
*Myndir: SamVit*




*Snotuligi básurin hjá Rainbow Seafood í Brússel. Ungu menninir í fyritøkuni hava altíð nógv um at vera*

Føroyskt vinnulív hevur aftur verið úti í heimi og kunnað umheimin um, hvat vit hava at selja av fiskavørum, og hvat vit kunnu hugsast at vilja keypa av tí, sum aðrir hava at bjóða.

Tilsamans 13 føroyskar fyritøkur eru við á eini av heimsins størstu fiskivinnuframsýning, European Seafood Exhibition (ESE), sum í hesi vikuni hevur verið í Brússel.

Framsýningin byrjaði týsdagin og letur aftur í dag.

Á ESE eru eini 1600 framsýnarar úr fleiri enn 70 londum, og talið av vitjandi liggur um 40.000 hvønn dagin.

Føroysku fyritøkurnar, sum eru savnaðar undir føroyska "hattinum", eru Bakkafrost, PRG, JFK, Sandoy Seafood, Delta Seafood, TG Seafood, Faroe Seafood, Rainbow Seafood, Orca, Nevið, Fiskamarknaður Føroya, EIK Banki og SamVit, sum samskipar føroysku luttøkuna.

Vinnuframagrunnurin stuðlar eisini føroyska átakinum í Brússel fíggjarliga.

Aðrar føroyskar fyritøkur eru eisini við á framsýningini í Brússel, og hesar eru á øðrum básum saman við sínum samstarvsfeløgum. Millum hesar eru eitt nú SNG, Samskip, Eimskip og FJM.

Eini 150-200 fólk úr Føroyum hava hesar dagarnar soleiðis luttikið og vitjað á ESE í Brússel.

Umboð fyri føroyskar fyritøkur, sum ikki eru við á sjálvari framsýningini, hava eisini vitjað á stevnuni.

### Nógv fundarvirksemi

Durita í Grótinum, sum er projektleiðari hjá SamVit, er við á European Seafood Exhibition í Brússel.

Hon sigur, at føroysku fyritøkurnar, sum eru á føroyska landabásinum, hava havt úr at gera við nógvum vitjandi og nógvum fundarvirksemi við áhugaðar keyparar og seljarar.

- Í fyrsta lagi kunnu vit siga, at føroysku fyritøkurnar selja seg við at vera til steðar á básinum, har tær marknaðarføra seg við sínum vørum og tænastum og bjóða sínum viðskiftafólki inn til prát.

Spurd, um tað er væntandi, at sáttmálar kunnu koma undir land á eini slíkari framsýning, sigur projektleiðarin:

- Jú, tað er so heilt avgjørt, at her kunnu týðandi avtalur koma í lag. Vit síggja, at føroyskar fyritøkur eru fult "bookaðar" við fundum, bæði við verandi viðskiftafólk og onnur nýggj.

Hon heldur, at ESE er eitt so stórt tiltak, har keyparar og seljarar úr øllum heiminum hittast, at tað illa kann hugsast, at týðandi avtalur ikki kunnu spyrjast burtur úr luttøkuni.

- Á slíkum framsýningum hittast viðskiftafólk, sum longu hava samstarv, og tí er luttøkan eisini ein partur




*PrimaFisk bjóðar vælumtóktu fiskapylsurnar, sum er ein lutfalsliga nýggj framleiðsla í Føroyum*



*Orca hevur altíð ein spennandi bás – við hummarum og krabbum. Tað "fangar" at síggja livandi krabbadýr í búri*